## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag og hósdagin:**
Hann minkar niður í gul til stívt andøvsgul av landsynningi. Hósdagin minkar hann enn meira Skýggjað, men fyri tað mesta turt. Hitin umleið 7 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
At byrja við lítið lot av ymsum ættum, men út á dagin frískar hann upp í gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði. Skýggjað og regn at byrja við, men seinni vátaslettingur. Hitin umleið 5 stig, móti náttini niður móti frostmarkinum.




**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði. Skýggjað og av og á kavaælingur. Hitin millum ÷1 og ÷6 stig.

# Soleiðis byrjaði Ingálvur

LIST

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Í einum sýnisglugga í Tróndargøtu í Havn var einaferð í 1937 ein søluframsýning av andaligum bókum, sum Petur Háberg hevði savnað saman og vildi selja. Hann helt, at sýningin sá eitt sindur fátæksligt út og heitti á ein ungan mann í meinigheitini, sum hann visti dámdi væl at tekna og mála um at prýða framsýningina við onkrum myndatilfari.

Listamaðurin var ongin annar enn tann tá 17 ára gamli Ingálvur av Reyni, sum í dag verður róstur upp og niður eystur og vestur fyri listarligt avrik, íð bert ein pinkulítil partur av landsmonnunum skilir, men sum øll vita hevur nógv virði listarliga og ikki minst í krónum og oyrum. Fyri nøkur er listin Ingálvi endurtøka av nýggju klæðum keisarans, fyri onnur er hon opinbáringin til nýggjan heim, sum bert fáum er beskorið at skoða.

Men aftur til fyrsta málningin.

– Hann hevur hingið hjá okkum alla mína tíð og eri eri fødd í 35, sigur Gunnvør Johannesen av Glyvrum.

– Pápi mín, Jákup Martin Kjeld, var lærari við realskúlan í Havn. Hann var teknilærari hjá Ingálvi. Pápi kom fram við sýnisglugganum hjá Petur Háberg og keypti annan av teimum báðum málningunum. Ingálvur hevur fortalt fyri mær seinni, at hann var ovurfegin og errin av at sjálvasti teknilærarin keypti hendan málningin, sigur Gunnvør Johannesen.

Gunnvør heldur nógv av eldru listini hjá Ingálvi. Sjálv hevur hon eisini fleiri tekningar av Ingálvi hangandi heima.

Sig mær heilt erliga, hevði tú keypt ein av teim nýggjaru málningunum hjá Ingálvi í dag?

– Nei, so bestemt ikki, eg skilji púrasta einki av hesi nýggju listini, sigur Gunnvør, sum enn dagliga fegnast um hugnaliga málningin frá 1937, sum hevur verið ein partur av hennara lívið, alt lívið.



*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷14 |
| Nuuk | ÷8 |
| Qaqortoq | ÷9 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | - |
| Halifax | - |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 7 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 1 |
| Oslo | - |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | - |
| Helsinki | ÷3 |
| Moskva | ÷7 |
| Berlin | 3 |
| Warzawa | 1 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 1 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 6 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 13 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 17 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 19 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | - |
| New York | 0 |
| Miami | 17 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | - |
| Panama | 32 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | - |
| Buenos Aires | 29 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst í ein útsynning úr Íslandi, stendur mest sum í stað, og rættiliga lýggj luft rekur inn yvir Føroyar av landsynningi.




Seinni í vikuni fer eitt lágtrýst frá Svalbard suðureftir móti Mið-Skandinavia og ein hátrýstryggur breiðir seg frá Eystur-Grønlandi í ein landsynning. Køld luft við kavaælingi rekur inn yvir Føroyar norðaneftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/12 kl. 06⁰⁰-19/12 kl. 06 ⁰⁰. Hitin í gjár: 7,1°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

## AVFALL




Avfallið: 0,2 mm - mált frá 18/12 kl. 06 ⁰⁰-19/12 kl. 06 ⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 42,6 mm

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG




12. MAÐUR
http://soccer.at/faroes

## VESTFALLSKYRRINDI

12. des.: Mánin næstur jørðini
18. des.: Seinna kvarte
25. des.: Tendring
28. des.: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Skipalistin 2000

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. des. | 01:41 | 14:17 | 00:41 | 13:17 | 00:56 | 13:32 | 03:41 | 16:17 | 04:41 | 17:17 | – | 12:32 | 11:32 | – | 01:56 | 14:32 | 02:56 | 15:32 | 01:26 | 14:02 | 02:41 | 15:17 |
| 21. des. | 02:52 | 15:22 | 01:52 | 14:22 | 02:07 | 14:37 | 04:52 | 17:22 | 05:52 | 18:22 | 01:07 | 13:37 | 00:07 | 12:37 | 03:07 | 15:37 | 04:07 | 16:37 | 02:37 | 15:07 | 03:52 | 16:22 |
| 22. des. | 03:49 | 16:14 | 02:49 | 15:14 | 03:04 | 15:29 | 05:49 | 18:14 | 06:49 | 19:14 | 02:04 | 14:29 | 01:04 | 13:29 | 04:04 | 16:29 | 05:04 | 17:29 | 03:34 | 15:59 | 04:49 | 17:14 |
| 23. des. | 04:36 | 16:57 | 03:36 | 15:57 | 03:51 | 16:12 | 06:36 | 18:57 | 07:36 | 19:57 | 02:51 | 15:12 | 01:51 | 14:12 | 04:51 | 17:12 | 05:51 | 18:12 | 04:21 | 16:42 | 05:36 | 17:57 |

www.sosialurin.fo